# ítróttur

Nr. 236 • hósdagur • 9. desember 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo


StÍF-Neistin 17-26 (9-11):

# Einsamallar á odda



*Eina løtu fylgdu tær á heimaliðnum væl við, men seinastu løtuna skrædnaði av álvara*

**Við sigrinum á StÍF hevur Neistin lagt seg einsamallar á odda í bestu kvinnudeildini**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Í øllum førum fram til leygardagin eru Neistakvinnurnar einsamallar á odda í bestu kvinnudeildini í hondbólti.

Hetta stóð greitt, tá tær týskvøldið vunnu útidystin á StÍF í sannførandi stíli. Longu fyri steðgin hevði Neistin hug at leggja sjógv niður til mótstøðuliðið, men í løtunum undan steðginum tók munurin aftur at minka.

StÍF royndi eisini eftir steðgin at halda fast í Neistanum, og ta einu ferðina vunnu tær seg eisini upp á javnt, men so var liðugt.

Seinastu 20 minuttirnar settu tær bláu av álvara ferð á. Eftir at hava strítt seg upp á 14-14, skoraðu tær á heimaliðnum bara tríggjar ferðir afturat, og tá mótstøðan samstundis sendi 12 bóltar í kassan, var ikki stórvegis at tosa um.

### Einsamallar á odda

Og úrslitið hevur so við sær, at Neistin nú eru einsamallar á odda í kvinnudeildini. Her hava tær so leikt tveir dystir fleiri enn VB og tríggjar dystir fleiri enn Stjørnan, so enn munnu tær ikki kenna tað soleiðis, at tær eru slopnar nakran veg avstað.

Leygardagin verður meira álvara aftan fyri í so máta. Tá kemur VB á vitjan í Havn, og tann dysturin líkist í øllum førum eini veruligari styrkisroynd, har Neistin skal vísa, hvørt tær veruliga ætla at leggja seg út í oddastríðið, ella um talan fyrst og fremst skal verða um tvídyst við Søljuna um bronsuna.

StÍF tykist hinvegin hugsa meira um, hvussu tær skulu sleppa nakran veg úr tunga endanum av talvuni. Her hevur tað fyrst og fremst verið Kyndil, sum tær hava stríðst við.

Dysturin í tølum
StÍF-Neistin 17-26 (9-11)
Málskjúttar
StÍF: Sunfríð B. Jacobsen 10(3), Rebekka Justinussen 4, Malan Petersen 1, Rosa Johannesen 1, Poula D. Olsen 1
Neistin: Marjun Tróndarson 10(5), Simona Petersen 9, Ása Dam á Neystabø 3, Kára á Dunga 2, Lív Sørensen 1, Annika Thomsen 1
Brotskøst: StÍF 3, Neistin 6
Útvísingar: StÍF 1, Neistin 1
Dómarar: Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen

## SUNSET KAPPINGIN

KVINNUR

| | dystir | v | j | t | v. mál | t. mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 9 | 7 | 0 | 2 | 277 | 191 | 86 | 14 |
| 2 VB | 7 | 6 | 0 | 1 | 214 | 142 | 72 | 12 |
| 3 Stjørnan | 6 | 6 | 0 | 0 | 163 | 123 | 40 | 12 |
| 4 Søljan | 8 | 4 | 0 | 4 | 223 | 198 | 25 | 8 |
| 5 VÍF | 8 | 4 | 0 | 4 | 187 | 186 | 1 | 8 |
| 6 StÍF | 8 | 1 | 1 | 6 | 167 | 212 | -45 | 3 |
| 7 Kyndil | 7 | 1 | 1 | 5 | 131 | 192 | -61 | 3 |
| 8 Tjaldur | 7 | 0 | 0 | 7 | 135 | 253 | -118 | 0 |

## Venjaraskifti í Neistanum

Tað hevur ikki hepnast nakað serliga væl hjá besta mansliðnum hjá Neistanum í ár. Hóast liðið telir nakrar av størstu profilunum í landinum, so hava úrslitini higartil verið nakað nógv lakari, enn nevnd og viðhaldsfólk høvdu roknað við. Serliga seinastu dystirnir hava víst, at liðið als ikki hevur megnað at lyft seg upp til tað, sum roknast kann við, og nú hevur nevndin so tikið stig til at loysa hesar trupulleikar.

– Vit hava gjørt av, at rokera eitt sindur við manningini. Framyvir verður tað Sámal Tróndur Finsson Johansen, sum skal standa fyri venjingini. Damir Oros, sum higartil hevur verið leikandi venjari, verður framyvir bara leikari, sigur Jón Kragesteen, formaður í Neistanum.

Júst leikluturin hjá Damir Oros hevur av fleiri verið mettur sum ein av orsøkunum til laku úrslitini. Tað hevur í øllum førum verið ein sannroynd, at ársins leikari í fjør bert hevur verið ein skuggi av sær sjálvum hetta kappingarárið. Nakað sum helst hevur verið tengt at, at hann ikki hevur trivist serliga væl í venjaraleiklutinum.

**-jm**

## MB-SÍF leygardagin

Nú er greitt, nær seinni dysturin millum MB og SÍF skal spælast. Ein dystur, sum skal gera av, hvørt av liðunum skal halda plássinum hjá FSV í aðru deild, men sum av undir givnu umstøðunum hevur drigið út nakað leingi.

Í farnu viku gjørdi Dómsnevndin hjá FSF so av, at seinni dysturin skal spælast sum skjótast, og nú er ein dagfesting so eisini ásett.

Leygardagin kl. 14.00 fer Birgir Sondum so at blása í floytuna, soleiðis at seinastu 90 – ella kanska 120 – minuttirnir av kappingarárinum kunnu spælast. Og hesaferð kunnu liðini so bíða til hálvan tíma undan dystarbyrjan, áðrenn dómaraseðil verður latin dómaranum.

**-jm**

## Nocko vrakaður í Randers

Fyrrverandi HB-leikarin Nocko Jokovic er vrakaður í Superligafelagnum Randers.

Tað er venjarin hjá Randers, Lars Olsen, sum hevur gjørt av, at superligahópurin hjá felagnum skal skerjast úr 32 leikarum niður í 25 á nýggjárinum. Hetta verður gjørt fyri at hækka støðið til venjing, sigur Lars Olsen. Millum teir sjey leikararnar, ið eru vrakaðir, er altso Nocko Jokovic, sum í seinnu hálvu av kappingarárinum 2002 leikti við HB, sum vann føroyameistaraheitið tað árið.

**-tn**

## Holst heiðraður

Á árligu fótbóltsgallaveitsluni hjá donskum fótbólti, sum varð hildin um vikuskiftið, varð Christian Holst Lamhauge heiðraður sum »årets profil« í donsku aðru deild.

Christian Holst Lamhauge er hálvur føroyingur, og í fjør var hann eitt skifti kring landsliðið. Hann varð skiftur inn í útidystinum móti Skotlandi, fyri síðani at sita beinkinum í samfullar 90 minuttir í seinasta EM-undankappingardystinum móti Litava. Síðani hava ikki verið boð eftir Lyngby-framherjanum, men møguliga kann heiðranin um vikuskiftið hjálpa honum í so máta.

Tað vóru spælarar úr donsku fyrstu og aðru deild, sum høvdu greitt atkvøðu til »årets profil«.

**-jm**